Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

## Skammiligt!

### *Oddagrein*

FØROYA fólk máttu ásanna í seinastu viku, at mangir politikarar eru lítið at sær komnir. Spurningurin er, um teir hava tann førleika, ta virðing og ta tign, sum ein løgtingssessur í sjálvur sær eigur at krevja.

VIT hoyrdu t.d., at politikarar beinleiðis løgdu eftir Sjónvarpi Føroya og óbeinleiðis eftir tíðindafólkum. Tey vórðu skuldsett fyri at rangsnúgva, manipulera og fyri at propagandisera.

HETTA eru grovar skuldsetingar ímóti triðja parti, sum ikki fær vart seg. Tað er ófatiligt, at løgtingsformaðurin ikki talar at slíkum álopum.

UPPAFTUR meira óhugnaligt er, at ein politikari í hesum sambandi hóttir við ikki at veita fígging til henda stovn, um tað aftur skuldi verðið neyðugt. Slíkt er barnsligt og óbúgvið. Tað er tí gott, at Starvsmannfelagið ger vart við seg í slíkum føri.

EITT tíðindafólk, sum hevur fylgt einum máli, má hava loyvi til at gera sína niðurstøðu ella tulking. Og tá Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, kemur við einum uppskoti, sum løgmaður, Anfinn Kallsberg, higartil hevur víst frá sær, so má tíðindafólkið hava rætt til at siga, at Bjarni Djurholm gongur ímóti løgmanni, um tíðindafólkið annars kemur til hesa niðurstøðu.

MEN tað vóru ikki bara álop á Sjónvarp Føroya. Tingfólk úr Fólkaflokkinum løgdu eisini eftir Føroya Fiskimannafelag, tí Fiskimannafelagið ikki hevur gjørt eina eftirlønarskipan fyri limir sínar. Fiskimannafelagið hevði heldur ikki møguleika at verja seg, hví felagið ikki hevur teknað eina eftirlønarskipan fyri limir sínar. Tí áttu tingfólk eisini at havt varað sín munn í álopinum á fakfelagið hjá fiskimonnum.

FRAMFERÐIN hjá ávísum tingfólkum henda dagin var einki annað enn skammilig.

*Sosialurin*



*Tilgjørd mynd*

# Prestakjólin er skiftur út við oljuklæði

*Peter O. K. Olofson segði seg fyrr í ár úr starvi sum prestur í Fuglafjarðar prestagjaldi, men hann liggur ikki á latu síðuni. Peter er farin at royna sjólívið, og tað heldur hann verða spennandi*

STEFAN Í SKORINI

Tá ið Ljósafelli fór til Flemish Cap í kanadiskum sjógvi 10. juni, mynstraði Peter O. K. Olofson við skipinum.

Peter er ein kendur persónur í Føroyum, av tí at hann hevur verið ósamdur við bisp, tá ið hann var prestur í Fuglafjarðar prestagjaldi. Henda ósemja hevði við sær, at Peter segði seg úr starvi sum prestur og fór at royna okkurt annað.

**Fyrsti túrurin**

Fyrsti túrur hjá Peter var á Flemish Cap í kanadiskum sjógvi, har roynt varð eftir svartkalva. Har fiskaðu teir bara í hálvan annan mánað. Veiðan var eini 180 tons, og fiskiskapurin var smáligur. Henda veiðan varð løgd upp í Havn í síðstu viku.

Nú er leiðin løgd vestureftir í russiskan sjógv í Barentshavinum, har túrurin verður gjørdur liðugur. Har verður roynt eftir toski. Ljósafelli er júst komin á fiskileið, men eins og á Flemish Cap hevur verið heldur smáligt við fiskiskapinum, sigur skiparin á Ljósafelli, Atli Hansen.

Ætlanin er at fáa eini tvey hundrað tons í Barentshavinum, sum er kvotan, teir eiga, áðrenn leiðin verður løgd heimaftur. Tað er torført at meta um, nær Ljósafelli aftur liggur við bryggju. Tað veldst alt um, hvussu fiskiskapurin verður.

Fáir bátar eru har um leiðir, men Sundaberg er staddur onkustaðni vestanfyri Ljósafelli, og onkur hissini russari roynir eisini har.

**Ongantíð verið við fiskiskipi fyrr**

Peter O. K. Olofson sigur, at sjólívið er eitt spennandi starv, tí hann hevur ongantíð roynt tað fyrr. Hetta er fyrstu ferð, at hann er úti og siglir við einum fiskiskipi, men einaferð skal verða fyrstu ferð.

Tá ið Sosialurin hevði Peter í telefonini, órógvaðu vit hann, meðan hann arbeiddi við at reinskera hýsu, og fyrr um morgunin hevði hann fingist við at fáa veiðuna í frystilastina. Annars er tað ymiskt, hvat Peter tekst við umborð.

Reiðarin Mortan Johannesen hevur bara rós at bera Peteri, sum altíð er til dystin fús til eina nýggja avbjóðing, sum í hesum føri umborð á Ljósafelli.

**Tænir Gudi har ein er**

Peter O. K. Olofson leggur dent á, at hansara kall framvegis er at verða prestur, men sum viðurskiftini eru í føroysku fólkakirkjuni nú, er hetta ikki møguligt, og tí hevur hann valt annað starv.

Nú er prestakjólin so skiftur út við oljuklæði, men ein mynstrar bara ein túr í senn, so Peter kann ikki siga, hvussu leingi hann verður verandi umborð.

Tað er stórur munur á at hava sína dagligu gongd í lastini umborð einum langfaratrolara, og so at verða sálarhirði og prestur hjá fuglfirðingum, men tað er ikki so avgerandi, bara ein sum kristin tænir Gudi, har man er.

- Vit hava øll ymisk køll her í lívinum, men tað, sum er avgerandi fyri meg og øll onnur kristin, er, at man tænir Gudi, har man er staddur, sigur Peter.

*Ljósafelli*





# Yvirfeitt

*Fyri fyrstu ferð í søgu mannaættarinnar er talið á ov feitum fólkum líka stórt sum talið á ov klønum fólkum*

NICLAS JOHANNESEN

1,1 milliard menniskju viga í dag meira enn teirra lækni kann viðmæla. Yvirfóðrað og undirstimbrað er høvuðsniðurstøðan.

Størstu byrðarnar bera lond so sum Brasilia og Columbia, har brýtur í bæði borð: Millum 30 og 40 prosent av íbúgvunum viga ov nógv. Restin vigar ov lítið. Í Norðuramerika verður nú hugt eftir egnum nalva. Á burgarakontinentinum - har chipsið hevur verið skolað dúgliga niður við cola, har ferjur og bussar hava skift plastikk setrini út soleiðis, at vaksandi talið av yvirvaksnum menniskjum eisini sleppa upp í part - er eitt avíst forstáilsi fyri, hví so nógvur fiti plágar so nógv menniskju. Tú er tað, tú etur.

Men at skilja, hvussu kinesarar og fólk úr eysturevropa nú eisini dragast við yvirvekt passar ikki heilt við gamla vanahugsan.
Alla skyldina hevur ídnaðarkollveltingin, siga frøðingarnir. Við henni fluttu fólk av bóndagørðum inn til býin. Maskinur avloystu musklarnar og nú stívliga 100 ár aftan á flóta meiri enn 50 prosent av vesturlendingunum oman fyri teirra idealvekt.



*Alt størri partur av heimsins borgarum velja burgaran sum teirra dagliga breyð. Granskarar staðfesta, at í kjalarvørrinum á grill-mat-mentanini finnast 1,1 mia. yvirfóðrað og undirstimbrað menniskju*

**Tungir kinesarar**

Eisini í menningarlondunum er talið á ov feitum fólkum eksploderað. Í kjalarvørrinum á búskaparliga vøkstrinum í Kina seinastu tíggju árini komu broyttir matvanar.

Talið á fólkum, ið eta fitandi mat, er vaksið úr 23 prosentum upp í 67 prosent. Úrslitið er, at talið á ov feitum fólkum er økt úr níggju prosentum upp í fimtan prosent.

Í fólkaríkasta landinum í heiminum merkir hetta tað sama sum, at 66 milliónir menniskju nú viga meira enn gott er fyri tey sjálvi. Í USA verður staðfest, at í 80'unum opnaði McDonalds fimm nýggjar junkmatstovur - um dagin. Fýra teirra uttan fyri USA. Heimurin etur feitar burgarar, chips og cola sum ongantíð áður. Tað er bíligt, men ikki serliga sunt.



Meðan undir- og meðalklassin taklar trupulleikan við at eta diet-tablettir sum ongantíð áður, so er yvirklassin farin at skurðviðgera seg sjálvan. Bara í 1999 lótu 400.000 amerikanarar teirra serlækna súgva feitt úr teirra yvirvaksnu goymslum umkring lendarnar og nalvan.

Eftir standa 1.1 milliard menniskju, ið ikki hava ráð at spara upp til skurðviðgerð og tablettir, men hava tó nokk í fóðrinum ein Big Burger Meal aftrat.

Kelda: The Vancouver Sun - frágreiðing frá atljóða ráðstevnu um matvanar

# Nú er festival tíð

*Árligi jazz- fólka- og bluesfestivalurin í Norðurlandahúsinum verður settur í kvøld*

RÚNAR REISTRUP

Í kvøld og komandi fýra dagarnar fer Tórshavnar jazz- fólka- og bluesfestivalur at seta sín dám á Havnar bý.

Festivalurin verður settur í Norðurlandahúsinum í kvøld klokkan 20.00, beint áðrenn teir báðir klaverleikararnir Jóhannes Andreassen og Stamen Stantshev seta seg við hvør sítt flygel at spæla løg eftir J.S. Bach.

Tann hálva tíman áðrenn festivalurin verður settur, fer bigbandið Jassarnir at hita áskoðarafjøldina upp úti í forhøllini í Norðurlandahúsinum.

Stamen og Jóhannes framføra í ein hálvan tíma í konserthøllini, og aftaná tekur ein donsk trio við Arne Forchammer á odda yvir.

Tá hendan framførslan er komin at enda nakað eftir klokkan 21, kunnu áhoyrararnir velja ímillum tvær framførslur í meira óhátíðarligum umhvørvi. Ivory saman við víðagitna saxofonistinum John Purcell fara at spæla etniskan jazztónleik í Klingruni. Samstundis fer hetlendski violinspælarin Trevor Hunter at spæla nøkur løg í musikcafeini.

Fyrsta kvøldið á Jazzfestivalinum 2000 endar við at íslendski bólkurin Hallas Travel við Bjørn Thoroddsen á odda framførir tað, ið kallað verður „musikteatur" ella tónleikasjónleikur.

Jazzfestivalurin varir til leygarkvøldið 12. august.

team 85 · 31 65 11

**Shetland Cruise 2000** summarið
www.smyril-line.fo
**SMYRIL LINE**
**Tel 34 59 00**

**Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag**



**Gisting á hotelli**
*úr einans ...* (í lágárstíð) **864,-** fyri hvønn



**Gisting á vallaraheimi**
*úr einans ...* (í lágárstíð) **691,-** fyri hvønn



**Privat gisting**
*úr einans ...* (í lágárstíð) **819,-** fyri hvønn

**Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30**

***Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu***

***Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.***



**Ring og hoyr nærri !**

**e-mail: booking@smyril-line.fo**